# Kringvarpið átti at slept nýggjársrøðu løgmans

**- Nýggjársrøða løgmans gjørdist sum væntað eitt høvi hjá løgmanni at seta farna árið og sína løgmanstíð í eitt bjartari politiskt ljós, sigur Høgni Hoydal, sum mælir Kringvarpinum til at sleppa nýggjársrøðu løgmans, tá val er í hondum**



NÝGGJÁRSRØÐA
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*

Atgongdin til altjóða samfelagið. Útlendingamálið. Vaksandi stættarmunur. Og vantandi búskaparstýring.

Hetta eru økini, sum andstøðuleiðarin Høgni Hoydal eftirlýsir í nýggjársrøðu løgmans, sum er prentað aðrastaðni í blaðnum.

- Nýggjársrøða løgmans var burturav afturlítandi og ásannaði vantandi politisk mál. Trupulleikarnir og tær veruligu avbjóðingarnar, ið skulu loysast í nýggja árinum og teimum komandi, vóru mestsum heilt burtur, metir Høgni Hoydal.

Formaðurin í Tjóðveldi metir, at tey framstig, sum eru farin fram í 2007, ikki eru farin fram orsakað av landsins politisku leiðslu, men heldur hóast eina ABC-samgongu uttan nøktandi politisk mál.

- Løgmaður nevndi eitt nú minnilutaverju og tolsemi, umhvørvismál, luttøku í altjóða samstarvi, samleika og almennan málpolitikk. Men her kunnu vit bert sum tjóðveldisfólk staðfesta, at øll politisk stig á hesum økjum eru reist av tjóðveldisfólki, meðan vantandi mál og politiskar forðingar hava ligið millum ABC-flokkarnar, sigur Høgni Hoydal.

## Sleppið løgmansrøðuni!

Eitt er innihaldið. Annað er tíðarskeiðið, sum orsakað av valdegnum tann 19. januar eftir andstøðuleiðarans tykki gerst partur av einum valstríði.

*- Kringvarpið átti at slept nýggjársrøðu løgmans, tí røðan gerst orsakað av valdegnum um tríggjar vikur eitt høvi hjá løgmanni at seta farna árið og sína løgmanstíð í eitt bjartari politiskt ljós, metir Høgni Hoydal, andstøðuleiðari*

- Kringvarpið átti orsakað av hesi støðuni at slept nýggjársrøðu løgmans, tí røðan gerst orsakað av valdegnum um tríggjar vikur eitt høvi hjá løgmanni at seta farna árið og sína løgmanstíð í eitt bjartari politiskt ljós nú undan løgtingsvalinum, metir Høgni Hoydal.

## Skattalættin

Høgni Hoydal fegnast um, at løgmaður nevndi "tann nýggja stættarmunin", sum hann málber seg. Og sjálvur nevnir hann skattalætta samgongunnar sum størstu hóttanina móti nýggja stættabýtinum.

- Her mugu vit sum tjóðveldisfólk fegnast um, at løgmaður nú ásannar tann skeiva politikkin, samgongan hevur rikið við heilt óneyðugum skattalættum, sum hava skapt sera stóran ójavna millum fólk og skeiklað búskapin avgerandi, sigur Høgni Hoydal at enda.

# Nýtt lív í gamalt stríð?



**Formaður Fólkafloksins tekur frástøðu frá tosinum um eitt nýtt stættarbýti, sum løgmaður var inni á í nýggjársrøðuni**

NÝGGJÁRSRØÐA
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*

*"... í hesum ráki eru tað mong, sum tillaga seg og gagnnýta øktu vælferðina, meðan onnur ikki vera við í hesum nýggja ráki. Tess meira er tað ábyrgdin hjá samfelagnum at taka sær av teimum, sum ikki fáa lut í ágóðanum. Vit mugu forða fyri, at eitt nýtt stættarbýti tekur seg upp".*

*- Grundleggjandi er tað skeivt yvirhøvur at tosa um eitt stættarstríð í Føroyum. Løgmaður hevur áður avblást stættarstríðið, og um útsøgn løgmans um eitt nýtt stættarbýti er ein roynd at blása nýtt lív í tann problematikkin, so taki eg frástøðu frá tí, sigur formaður Fólkafloksins, Jørgen Niclasen*

Soleiðis tók løgmaður til í nýggjársrøðu sínari. Men formaður Fólkafloksins er ikki samdur í, at eitt nýtt stættarbýti er ein átrokandi politisk avbjóðing. Jóannes Eidesgaard fekk annars toyggið frá arbeiðarafeløgunum, tá hann í 2005 segði, at stættarstríðið var av.

- Grundleggjandi er tað skeivt yvirhøvur at tosa um eitt stættarbýti í Føroyum. Løgmaður hevur áður avblást stættarstríðið, og um útsøgn løgmans um eitt nýtt stættarbýti er ein roynd at blása nýtt lív í tann problematikkin, so má eg taka frástøðu frá tí. Tað sigur formaður Fólkafloksins, Jørgen Niclasen.

Hann undirstrikar, at tað sjálvandi er ábyrgdin hjá einum og hvørjum politikara at syrgja fyri, at allir borgarar hava somu møguleikar, men haðani og til at tosa um eitt nýtt stættarbýti í Føroyum er ov nógv fyri fólkafloksformannin.

- Munurin á lágløntum og hágløntum í Føroyum kann als ikki lýsast sum ein stættarmunur í orðsins sanna týdningi. Serliga ikki, um vit hyggja út um landoddarnar og síggja, hvat eitt stættarstríð veruliga er fyri nakað, sigur Jørgen Niclasen.

## Samráðingar um Kyoto

Løgmaður segði seg eisini *"harmast um, at vit ikki enn hava víst í verki, at Føroyar taka trupulleikarnar við veðurlagsbroytingum í nóg stórum álvara"*. Tá Kyotosáttmálin var til viðgerðar í tinginum, var Fólkafloksurin ikki sinnaður at gerast partur av Kyoto-samstarvinum undir verandi treytum. Viðvíkjandi útsagnum løgmans um ábyrgd Føroya á økinum tvíheldur Jørgen Niclasen um, at vit mugu samráðast, áðrenn vit binda okkum til nakra avtalu.

- Eg taki undir við løgmanni í, at vit skulu fyrireika okkum til stóru umhvørvisráðstevnuna í Keypmannahavn í 2009, men einfalda kravið um at sleppa at samráðast, áðrenn vit binda okkum til nakað, halda vit fast um, sigur Jørgen Niclasen.

## Góð røða

Annars heldur Jørgen Niclasen, at talan var um eina góða løgmansrøðu, sum talaði breitt til allar føroyingar um yvirornaðu samfelagsgongdina. Og hann heldur ikki, at løgmaður førdi valstríð, sum ført verður fram aðrastaðni á síðuni.

- Talan var um eina lagaliga og "dekkandi" røðu, sum sømir seg eini løgmansrøðu, endar Jørgen Niclasen.